Føroyar-Gibraltar 3-0 (25-14, 25-21, 25-13)

# Eingin slingur í valsinum

**Føroyska kvinnuliðið vann leikandi lætt móti Gibraltar í hálvfinaluni, og eru tær nú til reiðar at verja gullilð frá undanfarnu Oyggjaleikum**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*
*– Isle of Man*

Eftir at hava vunnið seg rættiliga trygt úr bólkaspælinum, skuldu føroysku flogbóltskvinnurnar fríggjadagin spæla hálvfinalu móti næstbesta liðnum í hinum bólkinum, Gibraltar.



*Eingin slingur var í valsinum, tá føroysku flogbóltskvinnurnar hósdagin spældu hálvfinalu móti Gibraltar*

### Eingin ivi

Spenningurin var sjálvandi hampuliga stórur undan dystinum, men tað gjørdist tó rættiliga skjótt greitt, at her var einki sum helst at vera bangin um.

Føroysku kvinnurnar vóru snøgt sagt nógv betri enn hjá Gibraltar. Eisini hóast onkrar heldur óneyðugar misskiljingar gjørdu, at Gibraltar hóast alt fylgdi hampuliga væl við á stigatalvuni talvuni.

Tekniskt vóru tær als ikki í nær námind okkara gentum, og tær fingu tí ongan tíð lagt nakað veruligt trýst á, og tí tóktist vandi als ikki at vera fyri, at sigurin skuldi fara at gleppa okkum av hondum.

Ikki minst tóktist Helga Nordendal nú at vera munandi betri fyri, enn hon var í Guernsey. Tá tóktist hon bera ótta fyri, at ryggurin ikki fór at halda til at spæla, og tað er ikki annað enn náttúrligt, tá talan er um fyrsta dystin eftir skaðasteðg. Hesin óttin tóktist nú vera beindur burtur, og spennandi verður at vita, hvussu spæl hennara verður í finaluni.

Eftir at liðini soleiðis høvdu fylgst fyrsta triðingin av fyrsta settinum, settu okkara veruliga ferð á, og settúrslitini siga helst alt um, hvussu tryggur føroyski sigurin var.

### Torfør finala

Sigurin inniber, at Føroyar nú eru til reiðar at spæla finaluna, sum verður ímóti Saaremaa.

Í sínari hálvfinalu vunnu hesar somuleiðis ein tryggan sigur á Guernsey, og lítið er at ivast í, at talan tá verður um ein spennandi dyst.

Bæði liðini hava víst seg at vera alt ov sterk hjá nøkrum av hinum at nerta, so enn hava tær ikki verið settar undir trýst, men neyvan fer hetta at gera, at annar parturin fer at taka ein finalusigur sum nakra sjálvfylgju.



Føroyar-Gotland 1-3 (25-20, 23-25, 18-25, 18-25)

# Finaludreymurin brast

**Í løtum sýndu føroysku menninir satt stórspæl, men alt í alt gjørdust teir ov stuttir í hálvfinaluni móti Gotlandi**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*
*- Isle of Man*

Stóri spurningurin undan hálvfinaluni móti bólkavinnarunum úr Gotlandi tóktist vera, um føroyska liðið hevði reist seg, eftir greiða tapið móti Saaremaa.

Fyrsta løtan av dystinum prógvaði tó, at hetta so als ikki var nakað at óttast, tí føroysku menninir hava neyvan verið meira tendraðir enn tað sama, tá teir fóru á vøllin.

Fyrsta settið byrjaði sera væl frá okkara síðu, og áðrenn hinir vóru komnir rættiliga ígongd, høvdu okkara vunnið sær eina hampuliga leiðslu.

Í allar mátar var nógv meira kraft í føroyska avrikinum, í mun til tað, sum vit hava sæð í undanfarnu dystunum. Neyvleikin í hevingunum var størri, enn hann hevur verið og lættari var tí at fáa ferð á smasjini, sum vórðu send tvørtur um netið. Mest positivt var tað tó, at blokkurin fyri fyrstu ferð í kappingini veruliga tóktist at rigga.

Fleiri bóltar vórðu vunnir í blokkinum, har tað ikki minst var ein styrkur, at Ragnar Petersen veruliga hevði fingið glið á.

Eftir at Føroyar soleiðis høvdu nærum tjóvstartað, kom tó meira glið á spælið hjá mótstøðumonnunum, men hóast teir ongan tíð lótu føroyingarnar renna undan sær, so megnaðu teir ikki at vinna seg upp aftur í hesum settinum.

### Mistøk kostaðu

Næsta settið var talan framhaldandi um sera javnt spæl. Liðini skiftust um at hála stórspælið fram, og í fleiri førum var talan um bæði langar og undirhaldandi bóltar.

Miðskeiðis í settinum framdu okkara tó brádliga fleiri óenyðug mistók, sum tóktust íkoma av, at konsentratiónin hjá fleiri leikarum brádliga ikki var til staðar. Einar tríggjar ferðir vunnu teir bóltar, tí okkara gloymdu at tippa holið aftan fyri blokkin, og Gotland fekk óneyðugt møguleika at renna undan okkum.

Mistøkini vórðu tó rættað nakað seinni, men hetta varð tó ikki nóg mikið til at vinna tað mista innaftur, og tí slapp Gotland undan at koma sær í eina 0-2 støðu, sum ivaleyst hevði talað til fyrimuns fyri okkara.

Ístaðin fingu teir nú sinniligu yvirvágna í dystinum, og seinastu bæði settini vunnu teir eisini hampuliga sannførandi, tó at okkara í longum løgum royndu at muta ímóti.

Tað var tó ov seint og ov litið hjá okkara, sum soleiðis máttu taka til takkar við einum dysti um triðja plássið, heldur enn at sleppa at verða partur av einum finaludyst.

# Stuttligari við spenningi

**Tá vit eftir hálvfinalusigurin á Gibraltar tosaðu við Margit Joensen, segði hon seg síggja nógv fram til ein spennandi finaludyst**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*
*– Isle of Man*

Nakað eftir sigurin á Gibraltar fingu vit orðið á Margit Joensen, sum aftur í ár hevur sýnt sera gott spæl á liberoplássinum.

Eftir at hava ynskt henni tillukku við sigrinum, spurdu vit hana, hvussu føroyska liðið nú fór at fyrireika seg til finaluna. Um tað ikki kundi darva teimum eitt sindur, at tær enn ikki høvdu verið undir nøkrum veruligum trýsti, orsakað av væntandi mótstøðu.

- Tað er rætt, at vit enn ikki hava verið undir veruligum trýsti í dystunum, men hetta hevur eisini gjørt, at spæl okkara ikki hevur so gott, sum tað kann verða.

- Millum annað hjá mær sjálvari, har móttøkurnar eru sera týdningarmiklar, hevur ikki gingist nóg væl, men eg ivist ikki í, at hetta verður betri fríggjadagin. Tá verður nógv meira smasja móti okkum, soleiðis at eg alla tíðina verið í gongd, og so verður konsentratiónin størri, sigur hon.

### Stuttligari

Annars roknaði Margit við, at talan fór at verða um eina sera spennandi finalu.

- Bæði liðini hava verið sera sterk higartil, og enn hevur mótstøðan verið avmarkað. Tá talan verður um ein dyst, har mótstøðan er størri, fer hetta heilt víst at lyfta støðið á spælinum, og tað er sjálvandi eisini nógv stuttligari at spæla, tá talan er um ein spennandi dyst.

Hvørt hon roknar við at vinna gull ell silvur, vildi Margit tó einki siga um, tá vit at enda spurdu hana um vónirnar til dystin.

- Vit eru so avgjørt ikki vísar í nøkrum sum helst. Sjálvandi fara vit á vøllin fyri at vinna gullið, men vit vilja heldur ikki leggja óneyðugt trýst á okkum sjálvar. Øll hini rokna kanska við, at vit uttan víðari fara at verja gullið, og tað ætla vit sjálvsagt, men lætt verður tað so á ongan hátt, segði hon at enda.



*Margit Joensen ivast ikki í, at spælið frá báðum pørtum gerst betri, tá liðini verða løgd undir trýst*



máling & gólv
Johnstonés Stormshield
*royndir vísa at hon heldur í 15 ár
Betonmáling
10 l.
Bert 499 kr.
Vit hava eisini Johnstonés
Træverju
5 l.
399 kr.
máling & gólv
við Landavegin
Tlf. 316066

BILAR TIL SØLU
Volvo 440 TDI Diesel
Ár. 06-1994
Audi 100 Limosine
2,5 TDI Diesel
Ár. 10 - 1993
Sóltak · alufelgur · radio / cas. o.a.
Audi 100 2,5 TDI
Avant Diesel
Ár. 11 - 1992
Sóltak · alufelgur · viðfestikrók · radio / cas. o.a.
Audi 80 1,9 TDI Diesel
Ár. 05 - 1994
Sóltak · radio / cas. o.a.
Audi 80 1,9 TDI Diesel
Ár. 06 - 1994
Sóltak · alufelgur · automatgear radio / cas. o.a.
BMW 525 tds
Ár. 03 - 1994
Sóltak · radio / cas. o.a.
Ford Granada 2,8 I
ca. 170 HK
Ár. 1983 - Gev eitt boð
alufelgur · powerstýring · sentrallás · radio o.a.
Myndir síggjast á www.bilar.fo
Úrvalsbilar Spf.
530 Fuglafjørður
tel. 444943 · fax 444638 · far. 217704

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Pedagogar og hjálparfólk

Tórshavar kommuna søkir við hesum eftir pedagogum og hjálparfólkum til nýggja dagstovnin á Fløtum.

**Størvini**
Talan er um 2 pedagogstørv, 40 tímar um vikuna, og 5 hjálparfólkastørv, 40 tímar um vikuna.

**Stovnslýsing**
Dagstovninum á Fløtum er normeraður til 40 barnagarðsbørn, 20 tvey ára gomul børn og eina stovu við 10 til 12 børnum við serligum tørvi, sum letur upp 1. november.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv, har tit saman við leiðaranum fáa møguleika fyri at seta tykkara dám á stovnin, og annars vera við í øllum tí, sum skal til fyri at stovnurin kann virka eftir ætlan.

**Vit ynskja**
at umsøkjarin:
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- kann arbeiða sjálvstøðugt, taka avgerðir og er kreativur
- saman við starvsfólkunum er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið
- hevur hugsjónir, tá tað snýr seg um virksemið í einum barnagarði, sum eisini hýsir børnum við serligum tørvi
- dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- dámar væl at íðka ítrótt saman við børnunum
- dámar væl at vera úti í náttúruni við børnunum
- dugir at síggja møguleikar framum forðingar

**Setunarviðurskifti**
Størvini verða sett umleið 1. september ella eftir nærri avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri. Leiðari og fýra pedagogar eru settir í starv.

**Meir fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Jesper Roos Nielsen, leiðara, tlf. 322100/219959, ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 315160.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum viðmælum skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 1. august 2001.

SNARSKIVAN

Starv

## HANDVERKARI

Strandfaraskip Landsins lýsa við hesum eftir handverkara til viðlíkahaldsarbeiði á Farmaleiðum.

**Uppgávurnar hjá Farmaleiðum**
Høvuðsuppgávan hjá Farmaleiðum er at samskipa, viðlíkahalda og menna farma-flutningin millum meginøkið og útjaðarøkini í Føroyum.

**Starvið fevnir um**
Høvuðsuppgávurnar hjá handverkaranum:
- Standa fyri smærri viðlíkahaldi av útbúnaðinum og farmastøðum runt landið og annað fyrifallandi arbeiði
- Samskifti og samstarv við verkstað um viðlíkahald

**Førleikakrøv**
- Handverkaraútbúgving
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 30. juli 2001.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú venda tær til Heina á Borg, farmaflutningsleiðara, á tlf. 343060 ella e-post: hab@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*



eyðun nolsøe & terji rasmussen
eitt nummar... og seytjan onnur
1 eros 2 tú 3 nummar 4 80'ini 5 lívið er okkara gáta 6 mítt land 7 ljóðmynd 8 dansa
9 handan mjørkan 10 tey dansa eins og skuggar 11 hvussu kann eg vita? 12 sjalusi
13 eg flýggi til tónleikin 14 maria 15 skuggar yvir peking 16 gerandislag 17 morgunflog 18 afrodite
3arin
SMS - tel 35 35 35 - fax 35 35 36 - e-mail: tryarin@post.olivant.fo